# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 17.12.2024 |
| Mál nr.: | 24/18279-13 |
| Málsviðgjørt: | BL, RBM |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Sjúkrahúsverkið

(ásetingar um universitetssjúkrahús)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 29. apríl 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Aftaná § 1 verður sett:
“**§ 1a.** Sjúkrahúsverkið verður skipað sum universitetssjúkrahús.
*Stk. 2.* Sum universitetssjúkrahús veitir Sjúkrahúsverkið:
- Sjúklingaviðgerð á høgum støði,
- Heilsugransking á høgum støði,
- Kliniska venjing til lesandi innan heilsufakligar útbúgvingar á Fróðskaparsetri Føroya ella øðrum lærdum háskúla,
- Kliniska venjing til lesandi frá Heilsuskúla Føroya ella øðrum líknandi skúla, og
- Serútbúgving til heilsustarvsfólk, ið hava prógv frá Fróðskaparsetri Føroya ella øðrum lærdum háskúla.

*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um skipan av universitetssjúkrahúsinum.

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juni 2025.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í samgonguskjalinum millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn frá desember 2022 er ásett, at Universitetssjúkrahús verður skipað við heilsuvísindaligari gransking og førleikamenning.

Endamálið við at skipa Sjúkrahúsverkið sum universitetssjúkrahús, er at menna Sjúkrahúsverkið fram á leið, soleiðis at hetta kann koma sjúklinginum til góðar, við tað, at Sjúkrahúsverkið kann veita sjúklinginum betri viðgerð. Gransking vísir, at tey sjúkrahús, ið geva læknum og heilsustarvsfólkum umstøður og tíð til gransking og undirvísing, hava eina betri sjúklingaviðgerð.

Mett verður, at tað verður møguligt at draga fleiri læknar, sjúkrarøktarfrøðingar og onnur heilsustarvsfólk til Sjúkrahúsverkið, um Sjúkrahúsverkið verður universitetssjúkrahús. Soleiðis kann Sjúkrahúsverkið bjóða heilsustarvsfólki bæði størv og granskingarmøguleikar. Hetta fer eisini at økja um møguleikarnar at fáa granskingarstuðul, umframt at fáa atgongd til vísindalig tíðarrit.

Føroyar eru eitt lítið land og tí er tað lættari at gera landsfevnandi heilsugransking í Føroyum, enn í øðrum londum. Ávís viðurskifti eru serføroysk. Um eingin annar granskar í hesum viðurskiftum, verður eingin vitan um serføroysku fyribrigdini.

Tí verður mett, bæði í mun til granskingarendamál og sjúklingaviðgerð, at tað er ein fyrimunur hjá Sjúkrahúsverkinum at vera universitetssjúkrahús.

Í løtuni eru fleiri granskingarverkætlanir í gongd á Landssjúkrahúsinum. Í hesum verkætlanum eru sjúkrahúsini í Klaksvík og Suðuroy í summum førum viðvirkandi. Tó eru ongar sjálvstøðugar heilsugranskingarverkætlanir staðsettar á teimum báðum sjúkrahúsunum enn. Viðvíkjandi undirvísing er tað í løtuni so, at øll trý sjúkrahúsini eru góðkend sum undirvísingarstað fyri sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar, meðan bert Landssjúkrahúsið er góðkent sum undirvísingarstað fyri læknar.

Heilsugranskingareindin umboðar í dag alt Sjúkrahúsverkið í sambandi við heilsugransking, og arbeitt verður fram ímóti, at alt Sjúkrahúsverkið kann verða góðkent at útbúgva læknar. Hetta førir við sær, at bæði Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús eisini kunnu virkað sum undirvísingarstað fyri læknar. Hetta kann eisini innibera, at sjálvstøðugar heilsugranskingarverkætlanir kunnu staðsetast á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Suðuroyar sjúkrahúsi.

Umframt hetta, verður eisini mett, at tað fer at styrkja Fróðskaparsetrið, at Sjúkrahúsverkið verður universitetssjúkahús. Við einum universitetssjúkrahúsi, kunnu Fróðskaparsetrið og Sjúkrahúsverkið brúka hvønn annan í sambandi við víðariútbúgving og undirvísing. Fróðskaparsetrið kann brúka starvsfólk úr Sjúkrahúsverkinum og umvent. Tað styrkir sostatt Fróðskaparsetrið, at Sjúkrahúsverkið verður ment, bæði í mun til undirvísing og útbúgvingar.

*Álit um universitetssjúkrahús*

Álit um universitetssjúkrahús varð handað landsstýriskvinnuni í heilsumálum tann 13. september 2023, og komið er væl áleiðis at skipa Sjúkrahúsverkið sum universitetssjúkrahús, vísandi til tilmælini í álitinum.

Játtan á 1,5 mió. kr. varð sett av á fíggjarlógini 2024 til at skipa universitetssjúkrahús, og landsstýriskvinnan ætlar eisini komandi árini at seta pening av á fíggjarlógini til hetta endamálið. Henda játtanin er nýtt til at styrkja Heilsugranskingareindina innan Sjúkrahúsverkið við neyðugum stuðulsfunktiónum, undir hesum til pengainnsavnan og biohagfrøði.

Tann parturin av rakstrinum í Sjúkrahúsverkinum, ið fevnir um uppgávurnar hjá einum universitetssjúkrahúsi, er skipaður sum ein løgfrøðilig eind í Sjúkrahúsverkinum.

Semjuskjal varð undirskrivað í apríl 2024 millum landsstýriskvinnuna í heilsumálum og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum um, at tey tilmæli, ið viðvíkja báðum hesum málsøkjum í álitinum, skulu setast í verk. Undir hesum, at avtala verður gjørd millum Setrið og Sjúkrahúsverkið.

Samstarvsavtala millum Setrið og Sjúkrahúsverkið varð undirskrivað 26. juni 2024 og miðað verður ímóti, at heildarætlan (strategi) fyri heilsugransking verður liðug á heysti 2025.

Hetta eru alt viðurskifti, ið eru týðandi fyri at skipa Sjúkrahúsverkið sum Universitetssjúkrahús. Landsstýriskvinnan metir tí, at stundin er komin til at áseta reglur í lóg um universitetssjúkrahús.

*Universitetssjúkrahús í Danmark, Noregi og Íslandi*

Í álitinum um universitetssjúkrahús er lýst, hvussu universitetssjúkrahús eru skipað í Danmark, Noregi og Íslandi. Tað er ymiskt frá landi til land, hvørt universitetssjúkrahús verður skipað við lóg ella ikki.

Í Íslandi er ásett við lóg, hvørji krøv eru fyri at nýta heitið universitetssjúkrahús. Tað er ásett í lóg, at Landsspitalið er universitetssjúkrahús, og sjúkrahúsið í Akureyri er undirvísingarsjúkrahús.

Í Noregi er ásett í lóg, hvat krevst fyri at skipa universitetssjúkrahús. Eitt sjúkrahús skal søkja norska Heilsumálaráðið um góðkenning fyri at kunna brúka heitið universitetssjúkrahús. Treytirnar fyri at verða góðkent sum universitetssjúkrahús, eru ásettar í lóg.

Í Danmark eru universitetssjúkrahús ikki regulerað í lóg. Sundhedsstyrelsen hevur upplýst, at tað hvørki í reglugerð ella vegleiðing eru ásetingar um, nær eitt sjúkrahús kann kalla seg universitetssjúkrahús. Í Danmark eru tað regiónirnar, sum taka avgerð um, hvørji sjúkrahús í regiónini skulu vera universitetssjúkrahús.

*Lógarbroyting um universitetssjúkrahús*

Í álitinum um universitetssjúkrahús varð mælt til at áseta reglur í lóg um universitetssjúkrahús. Landsstýriskvinnan tekur undir við hesum tilmæli.

Fyrimunirnir við at skipa universitetssjúkrahús í lóg eru m.a., at Universitetssjúkrahús verður kjølfest í heilsuverkinum og greidliga skipað, at lógaruppskot verður tilevnað saman við viðkomandi pørtum í heilsuverkinum, soleiðis at breitt grundarlag er fyri ætlanini í skipanini, at lógaruppskotið verður viðgjørt í Løgtinginum, soleiðis at breitt politiskt grundarlag eisini er fyri ætlanini, at almenningurin fær við løgtingslógini eina bindandi fráboðan um, hvat

sjúkrahúsverkið er, og hvussu tað virkar og at universitetssjúkrahús verður skipað við løgtingslóg, viðførir harumframt meira stabilitet um universitetssjúkrahúsið. Við hesum kann universitetssjúkrahúsið ikki takast av á meira ella minni óformligum grundarlagi.

Rákið innan lógarsmíð í dag er, at fleiri og fleiri viðurskifti verða reglerað í lóg og kunngerð. Hetta av teirri orsøk, at viðurskiftini verða meira gjøgnumskygd fyri borgaran. Um uppgávur hjá einum stovni verða staðfestar í innstruksi, er tað ikki lætt at fáa innlit í, hvørjar uppgávur stovnurin veruliga røkir. Tá ið uppgávurnar hinvegin eru regleraðar í lóg ella kunngerð, verða ásetingarnar lýstar í Kunngerðarblaði og á www.logir.fo, og tað er lætt hjá borgarum, starvsfólki og øðrum at fáa vitan um, hvørjar uppgávur stovnurin røkir.

**1.2. Galdandi lóggáva**

Eingin lóggáva er um universitetssjúkrahús. Mett verður, at greiðast er, at áseta reglur um universitetssjúkrahús í galdandi sjúkrahúsverkslóg: løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 29. apríl 2022.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Endamálið við lógaruppskotinum er at áseta reglur í løgtingslóg um, at Sjúkrahúsverkið verður skipað sum universitetssjúkrahús. Hetta verður við til, at menna Sjúkrahúsverkið fram á leið, soleiðis at tað eisini kemur sjúklinginum til góðar, við tað, at Sjúkrahúsverkið kann veita enn betri viðgerð.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Sambært hesum lógaruppskoti verður Sjúkrahúsverkið skipað sum universitetssjúkrahús.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá: Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Sjúkrahúsverkinum, Fróðskaparsetur Føroya, Heilsustýrinum, Apoteksverkinum, Landslæknanum, Heilsutrygd, øllum feløgum hjá heilsustarvsfólkum, Sjúklingaráðnum, Granskingarráðnum, Vísindasiðsemisnevndini, Etiska ráðnum, MEGD, Krabbameinsfelagnum, Pensionistafelagnum og Felagnum Arvasjúkan.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Í áliti um universitetssjúkrahús, frá september 2023, er lýst, at Sjúkrahúsverkið nýtir umleið 0,15% av samlaðu játtan síni til heilsugransking og 0,58% av samlaðu rakstrarjáttanini til undirvísing og útbúgving.

Í álitinum verður mett, at arbeitt eigur at vera fram ímóti, at Sjúkrahúsverkið innan 7 ár skal nýta 1% av samlaðu rakstrarjáttan síni til heilsugransking og 1% til undivísing og útbúgving, tvs. tilsamans 2% av samlaðu rakstrarjáttan.

Í 2024 vóru 1,5 mió. kr. settar av á fíggjarlógini til universitetssjúkrahús og í 2025 verður 1 mió. kr. sett av til universitetssjúkrahús.

Vísandi til álit um universitetssjúkrahús, eigur man árliga at seta pening av á fíggjarlógini tey komandi árini, soleiðis at sjúkrahúsverkið, sum frálíður, fer at nýta 2% av samlaðu rakstrarjáttan sínari til heilsugransking, undirvísing og útbúgving.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Eftir at Sjúkrahúsverkið er skipað sum universitetssjúkrahús, skal bæði undirvísing og gransking støðugt mennast. M.a. skulu nýggir útbúgvingarmøguleikar setast á stovn og fer hetta at hava umsitingarligar avleiðingar fyri Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri heilsugransking í Føroyum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið kemur, at hava jaligar avleiðingar við sær fyri bæði heilsustarvsfólk og sjúklingar. Heilsustarvsfólk koma m.a., at hava betri møguleika at víðariútbúgva seg og granska. Eitt universitetssjúkrahús hevur lættari við at draga dugnalig heilsustarvsfólk til sín og fer hetta væntandi, at føra við sær, at sjúklingurin fær eina enn betri viðgerð í Sjúkrahúsverkinum.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Nordisk konvention om social sikring er galdandi í Føroyum. Ásetingar eru ikki í hesum lógaruppskoti, ið hava ávirkan á hendan sáttmála.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Eitt av endamálunum við at skipa Sjúkrahúsverkið sum Universitetssjúkrahús er, at Sjúkrahúsverkið skal fremja heilsugransking á høgum støði. Sjúkrahúsverkið skal støðugt menna seg innan heilsugransking.

Øll heilsugransking í Føroyum skal góðkennast av Vísindasiðseminevndini, sum hevur heimild í “Anordning nr. 961 af 15. juli 2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om videnskabsetisk behandling af sundhedsvidenskabelige forskningsprojekter”, sum broytt við anordning 1442 frá 29. juni 2021, (Vísindasiðsemilógin).

Vísindasiðsemilógin verjir einstaka granskingarluttakaran í sambandi við heilsugransking. Sostatt samsvarar Vísindasiðsemilógin við Europeiska Mannarættindasáttmálan**,** EMRS, sum var settur í gildi fyri Føroyar sum lóg tann 1. mai 2000 og við sáttmála sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Ásetingar eru ikki í hesum lógaruppskoti, ið hava ávirkan á europeiska mannarættindasáttmálan ella á sáttmála sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur við sær markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið ásetir ikki reglur um gjald til ávíst endamál.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið ásetur reglur um universitetssjúkrahús og áleggur sostatt Sjúkrahúsverkinum at skipa seg sum universitetssjúkrahús.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólki, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið gevur landsstýrisfólkinum heimild at áseta nærri reglur í kunngerð um universitetssjúkrahús.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Við hesum verður ásett, at sjúkrahúsverkið verður skipað sum universitetssjúkrahús.

Tað er tann parturin av virkseminum í Sjúkrahúsverkinum, ið fevnir um heilsugransking, undirvísing og útbúgving, ið við hesum verður skipaður í universitetssjúkrahús.

Sambært áliti um universitetssjúkrahús ber til yvirskipa at siga, at fyri at kunna kalla seg universitetssjúkrahús, skal eitt sjúkrahús:

- Veita sjúklingaviðgerð
- Fremja heilsugransking
- Veita kliniska undirvísing í heilsufakum, helst læknafrøði
- Hava samstarvsavtalu við eitt universitet
- Brúka ein ávísan part av sínari játtan til undirvísing og heilsugransking.

Endamálið við at skipa Sjúkrahúsverkið sum universitetssjúkrahús er at menna Sjúkrahúsverkið fram á leið, soleiðis at hetta kann koma sjúklinginum til góðar, við tað, at Sjúkrahúsverkið kann veita sjúklinginum betri viðgerð. Gransking vísir, at tey sjúkrahús, ið geva læknum og heilsustarvsfólkum umstøður og tíð til gransking og undirvísing, hava eina betri sjúklingaviðgerð.

Mett verður, at tað verður møguligt at draga fleiri læknar, sjúkrarøktarfrøðingar og onnur heilsustarvsfólk til Sjúkrahúsverkið, um Sjúkrahúsverkið verður universitetssjúkrahús. Soleiðis kann Sjúkrahúsverkið bjóða heilsustarvsfólki bæði størv og granskingarmøguleikar. Hetta fer eisini at økja um møguleikarnar at fáa granskingarstuðul, umframt at fáa atgongd til vísindalig tíðarrit.

Føroyar eru eitt lítið land og tí er tað lættari at gera landsfevnandi heilsugransking í Føroyum, enn í øðrum londum. Ávís viðurskifti eru serføroysk. Um eingin annar granskar í hesum viðurskiftum, verður eingin vitan um serføroysku fyribrigdini.

Tí verður mett, bæði í mun til granskingarendamál og sjúklingaviðgerð, at tað er ein fyrimunur hjá Sjúkrahúsverkinum at vera universitetssjúkrahús.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting. Lógin kemur í gildi 1. juni 2025.

Heilsumálaráðið, tann 17.12.2024

**Súsanna Bertholdsen**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig, aðalstjóri

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: